# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lagnufundur

G20 fundurin í London nú hósdagin er lagnufundur fyri heimin. Á G20 fundi hittast 20 tey mætastu ídnaðarlondini í heiminum. Hesi lond bæði samstarva og kappast og skulu nú í felag royna at bjarga heimsbúskapinum. G20 fundirnir eru ikki bara vælumtóktir. Nógv lond halda, at búskaparliga og fíggjarliga lagna heimsins í kreppuni er betur farin við eini felags heimsfevnandi skipan, har eitt nú Heimsbankin skipar fyri og gongur á odda. Síðan kreppan av álvara tók seg upp, hava USA og flestøll framkomin lond sett í verk hópin av fíggjarligum og búskaparligum hjálparpakkum til tess at tryggja bankakervini og fyri at halda vinnuligu hjólunum malandi. Trupulleikarnir eru sera stórir. Heimshandilin er linkaður, vandin fyri proteksionismu øktur, og arbeiðsloysið er vaksandi um allan framkomnan heim. Hetta gongur so aftur út yvir menningarlondini, og soleiðis vindur skeiva gongdin uppá seg. Hættislig støða, ið kann elva til politiskan ófrið og beinleiðis koma heimsfriðinum í vanda.

Stjórnir standa ivandi og ráðaleysar mótvegis hesi kreppu, ið sum ein sunami fløðir inn yvir eitt land fyri og annað eftir. USA hevur gingið á odda við bankahjálparpakkum og vinnuligum hjálpartiltøkum, meðan europear hava verið eitt sindur meira afturhaldandi við ógvusligum almennum tiltøkum. Orsøkin kann vera, at Europa fyri tað fyrsta óttast inflatión, ið kann standast av hesum ovurstóru hjálparpakkum fyri skattgjaldarans pening. Fyri tað annað hava nógv tey flestu ES lond, EFTA lond og onnur europeisk ídnaðarlond samhaldsfastar sosialar skipanir, ið tryggja, at fólk ikki beinanvegin missa hús og heim ella líða beinleiðis neyð, um maður ella kona gerast arbeiðsleys. Øðrvísi er í USA, har hesar grundleggjandi skipanir mangla ella eru farnar fyri bakka við bankunum. Luttakararnir á G20 hava tískil ymsar fortreytir og ymisk baksýni fyri fundinum.

G20 má og skal fáa fastatøkur á stóru altjóða trupulleikunum. Flestøll lond seta teirra álit á sera væl lýdda amerikanska forsetan, Barak Obama, ið longu hevur sýnt framúr áræði, dirvi, ágrýtni og virkisfýsni. Men fleiri G20 lond eru eisini ósamd við amerikanska forsetan um mál og útvegir. Avbjóðingin hjá Obama er sostatt at sameina ymisk sjónarmið, ymisk áhugamál og ymiskar tilgongdir til trupulleikarnar við atliti at eini felags heimsfevnandi kreppustrategi. Heimligu fortreytir Obamas eru ikki tespiligar: metstór skuld til Kina, methall á fíggjarlóg, kríggj í Irak og í Afghanistan, ein viknandi dollari, tryggingargeiri í beinabjølgi, banka-, byggi- og ídnaðargeirar í skeljasori – alt takkað verið ágrýtdarleysu og stuttskygdu neoliberalismuni hjá George W. Bush og fylgisneytum. Obama hevur mestsum bert sítt sera góða umdømi, sítt vit og sítt skil, sínar framúrskarandi persónligu eginleikar og sítt stak dugnaliga starvslið at líta á. Men hvør veit, um ikki tað júst er hetta, ið bjargar lagnufundinum í London og harvið bjargar heimsbúskapinum.

**Sosialurin**

## Tobbi tapti – Linda vann!

JOHAN SAMUELSEN



Torbjørn Jacobsen er farin í hernað móti donsku kulturimperialismuni í Føroyum, og serliga er tað Kringarpið, sum fær ákoyringarnar! Her má okkurt munagott gerast alt fyri eitt, tjóðskapinum at frama, sum sambært Tobba er álvarsliga hóttur, og Tobbi mælir beinleiðis til ein nýggjan jólafund ala hin tiltikna í Tinghúsinum í 1888, har fyrstu spírarnir til tjóðskaparrørsluna sóu dagsins ljós.

Og »vandin« fyri tjóðartýningini er somenn onki annað enn ein óskyldug undirhaldssending, x-factor, sum hevur verið send í DR hesi seinastu fríggjakvøldini. Og sum føroyingurin Per Zachariassen er framleiðslustjóri av, og hava vit so sanniliga eisini verið so heppin at eiga eina Lindu, sum hevur megnað at verið við frá byrjanini av, har heili 4000 danir vóru við, saman við okkara góðu Lindu, sum megnaði at vinna á øllum donsku luttakarunum og blíva vinnari av x-factor songkappingini 2009 – einastandandi, og hjartaliga tillukku Linda (og Per við ótrúliga teknikkinum!), har tú í hesi glaðu sending, var við at skapa Føroyum positiva umtalu í Danmark, har 2,2 mill. danir sótu framman fyri skíggjanum og hugdu, nú finalubrakið var fríggjakvøldið – tað skal verða løgið, um t. d. henda góða umtala, í mest eftirhugdu sjónvarpssending hjá DR, ikki fer at økja um ferðamannastreymin hendavegin, og tað man treingja til, í hesum fíggjarliga trongu tíðum hjá øllum pørtum innan ferðavinnuna – ongin lýsingarherferð í milliónaklassanum kemur upp á knøiini av hesum ótrúliga møguleikanum, sum Føroyar fingu, takkað verði Lindu, enntá púra ókeypis, framman fyri góðum 2 mill. dønum! Men líka leggur Torbjørn í! Kringvarpsstjórin helt tí, at allir føroyingar skuldu fáa høvi til at fylgja við, og eisini atkvøða um, hvør skuldi verða endaligur vinnari av kappingini, og hetta mátti sjálvandi vera beinleiðis, um atkvøðumøguleikin skuldi varðveitast – alt hetta átti Tobbi at vitað betur enn nakar annar, hugsa bara um, hvussu keðiligt tað er hjá Tobba og okkum øðrum at hyggja eftir einum fótbóltsdysti í sjónvarpinum, har man veit úrslitið frammanundan – er tað fótbóltur, so er alt í lagi hjá Tobba, og ikki eitt kis um flyting av Degi og viku!

Og so varð gjørt. SvF samsendi við DR 1, og tí mátti Dagur og viku sendingin sendast ein tíma forskotin. Og Torbjørn sá skriftina á vegginum! Hann sá fyri sær, at tjóðin stóð ikki til at bjarga, samleiki føroyinga var hóttur o.s.fr., um x-factorsendingin slapp í luftina, nei, nú var markið nátt fyri donsku kulturimperialismuni her á landi, hetta mátti steðgast her og nú, og málið varð reist á Føroya løgtingi av »bjargingarmanni« tjóðarinnar, Torbirni Jacobsen!

Ólíka er við politisku soap opruni hjá Tjóðveldi! Høgni Hoydal mælir til á politiskum vekingarmøti suðuri í Skálavík til nýggja tjóðskaparrørslu, onkur skrivar um urtapottar, annar ilskast inn á formannin, og nú, »stórmálið« hjá Tobba um x-factor og donsku kulturimperialismuna – sig so tað, at menn ikki eru verdir sína løn á tingi fyri at verja vunnin tjóðarrættindi og hesi megnarmál mugu eiga fyrsta rætt á skíggjanum, ikki so!? Meðan hóttandi búskaparstøða landsins verður als ikki umrødd - fleiri 100 tals milliónir eru millum inntøkur landskassans og útreiðslurnar, so risalántøkur uttanlands, saman við niðurskurði á komandi fíggjarlógunum, standa fyri framman – men á tjóðveldiskvørnini melur sama plátan: Tjóðveldi mælir til at skerja blokkin við góðum 600 mill. kr! So uppaftur færri pengar hjá almennu Føroyum er teirra boð upp á loysnirnar – x factor ella ei!! Nýggjur jólafundur – eg meini tað!

Føroyingar hava verið meiri ella minni undir danskari ávirkan í eini 600 ár, og veruleikin er, at danskt ikki hevur tann innbygda eginleika í sær, sum t. d. køvir eitt annað mál. Skulu vit endiliga tala um málsliga vandasigling hjá so fámentari tjóð sum okkara, so lúrir vandin á heilt øðrum staði, og tað er enska globala, massiva málávirkanin, sum tey ungu taka til sín, sum teirra annað mál, sum er ein nógv størri hóttan, enn danskt nakrantíð hevur verið, tí sum írskt tjóðarskald einaferð tók til: har onglendingurin hevur traðkað, har grør grasið ikki aftur!

So Torbjørn, uppgávan er stór, men vandin lúrir ikki í landsuðri!

**N.B.** Skrivað áðrenn »ynkeligu« umberingina frá Tobba til x-factorvinnaran Lindu.

## Yvirlýsing frá Føroyskum Sjúkrarøktarfrøðingum

Álitisumboðini á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi hava í dag verið á fundi á Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Fundarfólkið ásannar, at starvið sum sjúkrarøktarstjóri er eitt sera týdningamikið starv, tí tað m.a. tryggjar at heildartilboðið til sjúklingin er á høgum fakligum støði, og umboðar tískil hesi viðurksifti í ovastu leiðslu.

Niðurstøðan á fundinum er, at framferðarhátturin í samband við bygnaðarbroytingarnar í sjúkrahúsverkinum als ikki kann góðtakast og er brot á galdandi sáttmála. Hvørki felag, álitisumboð ella limir felagsins hava verið við í ráðleggingini av hesum broytingum. § 22 í sáttmálanum er brotin. Har stendur, at starvsfólk og álitisfólk skulu verða við í tilrættisleggingini tá avgerandi broytingar verða gjørdar á einum stovni.

Sambært góðum fyrisitingar siðið og fastari siðvenju eiga almenn størv at verða lýst leys. Hesar reglur brýtur Heilsumálaráðið, við tað at starvið sum sjúkrarrøktarstjóri ikki verður lýst leyst.

Kravið er, at ætlanirnar verða sleptar og at starvið sum sjúkrarøktarstjóri verður lýst leyst. Eisini skal felagið verður tikið við frá byrjan, um bygnaðarbroytingar skulu fremjast á økinum.

*Vegnað álitisumboðini*
Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, á Suðuroyar Sjúkrahúsi og á Landssjúkrahúsinum

**Vár í Gong, forkvinna**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.